# Lættur sigur hjá Stjørnuni

**Klaksvíkskvinnur byrjaðu har tær sleptu, tá ið tær á útivølli vunnu tryggan sigur á bronsuvinnarunum úr VÌF, sum ikki tykjast hava somu styrki sum farna kappingarár**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var ikki nøkur torfør uppgáva hjá Stjørnuni at basa einum nógv broyttum VÍF-liði, sum hevur mist berandi kreftir, ið vóru sjónligani saknaðar í dystinum sunnudagin.

## Góð breidd

Greipuvinnararnir úr Stjørnuni eru væl fyri. Landsliðsmálverjin Fríða Petersen er komin úr Kyndli, Beinta Joensen er komin úr Eysturoynni, og



*Hóast tað fyrr í summar ljóðaði, at Alina Olaru fóru at halda fram í fronskum hondbólti, so var hon á liðnum hjá Stjørnuni, sum sunnudagin vann tryggan sigur í Vestmanna*
*savnsmynd*

harafturat er Alina Olaru framvegis í felagnum, hóast tað fyrr í ár ljóðaði, at hon var á veg til franskan hondbólt. Sunnudagin vóru enntá tveir av landsliðsleikarunum hjá klaksvíkingum, Bára Skaale Klakstein og Annika Ljósstein, ikki við, so tað er lítið at ivast í, at Stjørnan hevur góða breidd.

VÍF hevur hinvegin mist Nikolinu Eyðbjørnsdóttir, Sóley Mikkelsen og Irinu Radovici, sum antin eru farnar av landinum ella eru givnar, og tað er ikki lætt at fylla holini eftir tær.

Tað sást eisini skjótt í dystinum sunnudagin, at gestirnir úr Klaksvík høvdu munin, og spakuliga vaks munurin millum liðini. Stjørnan hevði tí eina leiðslu upp á sjey mál í hálvleikinum, og eftir steðgin hildu tær á við at fara frá heimaliðnum, og tá ið dysturin var liðugur høvdu greipuvinnararnir vunnið við 12 málum.

At vestmenningar ikki eru so væl fyri á kvinnusíðuni í ár, sæst kanska best við, at tað einans vóru tríggir av leikarunum á liðnum hjá VÍF, sum komu á máltalvuna. Av teimum sekstan málunum hjá heimaliðnum skeyt Ioana Rapa tey tíggju!

### VÍF-Stjørnan 16-28 (10-17)

**VÍF:** Ioana Rapa 10(5), Fríða Marjunardóttir 4(1), Eyðritt Andreassen 2
**Stjørnan:** Alina Olaru 10, Beinta Joensen 5, Katarina Stjepanov 4(1), Joan M. Djordjevic 4, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreasen 2
**Brotskøst:** VÍF 6(6), Stjørnan 1(1)
**Útvísingar:** VÍF 6, Stjørnan 5
**Dómarar:** Kristian Johansen og Sámal Hansen

**1. deild menn**

**Støðan:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| StÍF | 1 | 1-0-0 | 34-28 | 2 |
| KÍF | 1 | 1-0-0 | 26-21 | 2 |
| VÍF | 1 | 1-0-0 | 27-26 | 2 |
| H71 | 1 | 0-0-1 | 26-27 | 0 |
| Kyndil | 1 | 0-0-1 | 21-26 | 0 |
| Neistin | 1 | 0-0-1 | 28-34 | 0 |

**1. deild kvinnur**

**Støðan:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Søljan | 1 | 1-0-0 | 41-18 | 2 |
| VB | 1 | 1-0-0 | 33-17 | 2 |
| Stjørnan | 1 | 1-0-0 | 28-16 | 2 |
| Neistin | 1 | 1-0-0 | 31-22 | 2 |
| StÍF | 1 | 0-0-1 | 22-31 | 0 |
| VÍF | 1 | 0-0-1 | 16-28 | 0 |
| Kyndil | 1 | 0-0-1 | 17-33 | 0 |
| Tjaldur | 1 | 0-0-1 | 18-41 | 0 |

# Eingin trupulleiki hjá Neistanum

**Neistakvinnurnar vunnu sunnudagin ein lættan sigur á StÍF. Fleiri nýggj andlit vóru at síggja á liðnum hjá Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Millum tær nýggju á liðnum hjá Neistanum vóru eisini nøkur gomul og kend andlit, sum hava funnið sær skógvarnar fram aftur. Eitt nú vóru tær báðar Kára á Dunga og Inga Dahl aftur á liðnum, og so var eisini ungi landsliðsleikarin Mia Káradóttir millum neistaleikararnar.

## Hingu í eina løtu

Strandakvinnurnar fylgdu við heimaliðnum fyrstu løtuna av dystinum, men tá ið fyrri hálvleikur fór at líða, fór Neistin spakuliga frá gestunum av Strondum. StÍF hevði ógvuliga ilt við at fáa nakað mál seinastu løtuna av fyrra hálvleiki, og tá ið so Simona Petersen (fyrr Dzygite blðm.) skoraði tríggjar ferðir síðstu fimm minuttirnar, hevði Neistin fingið eina góða leiðslu upp á fimm mál í hálvleikssteðginum.

Leiðslan hjá heimaliðnum øktist bara, so hvørt sum seinni hálvleikur leið, og tað var ongantíð nakar ivi um, hvønn veg tað bar.

Gestirnir av Strondum høvdu snøgt sagt ikki eins nógvar streingir at spæla uppá, sum heimaliðið hevði, og Neistin hevði eisini væl fleiri fólk á beinkinum, soleiðis at leikarar altíð kundu koma út og fáa hvíld, um tørvur var á tí.

Komandi vikuskifti skal Neistin taka dystin upp við grannarnar úr Kyndli, sum fingu oyruni í VB-maskinuna í Vági sunnudagin, meðan StÍF á heimavølli fær vitjan av uppflytarunum úr Tjaldur, og tá skuldi verið ein góður møguleiki hjá strandakvinnum at vunnið sær stig.

### Neistin-StÍF 31-22 (13-8)

**Neistin:** Ása Dam á Neystabø 8(1), Simona Petersen 6(2), Marjun Tróndarson 4, Lív Sørensen 4, Lív Reynheim 3, Mia Káradóttir 3, Annika Thomsen 2, Unn Kragesteen 1
**StÍF:** Anna Danielsen 5, Poula Olsen 4, Súnfríð Jacobsen 4(2), Rebekka Justinussen 3, Paula Høgnesen 3(2), Malan Petersen 2, Johanna í Króki 1
**Brotskøst:** Neistin 5(3), StÍF 6(4)
**Útvísingar:** Neistin 3, StÍF 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



bara galdandi leygardagin 13. oktober
Írsk Steak - til útkoyring!
við ristaðum piparfruktum, dublin-sauce og frískum salati
78,-
fá Rio Bravo & Hotel Vágum
Vit koyra út allastaðni í Havn og í Vágoynni
RIO BRAVO RESTAURANT · Beef & Steak House ·
RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 97
FLOGFELAG FØROYA · SØRVÁGUR · TEL 33 29 55 · hotel@ff.fo
TEAM85





VITUS BERING DANMARK
ÚTBÚGVINGAR Í HORSENS
Hevur hetta tín áhuga!
Útbúgvingar á donskum og enskum:
- Byggetekniker
- Bygningskonstruktør
- Markedsføringsøkonom
Útbúgvingar á donskum:
- IT-Ingeniør
- Adgangskursus
- Maskiningeniør
- Eksportingeniør
- Bygningsingeniør
- Produktionsteknolog
- Value Chain Management
- Kort- og landmålingstekniker
Ungdómsútbúgvingar
Diplomútbúgvingar
Skeiðvirksemi
Í tíðarskeiðnum – 27.09.-23.10.2004 verður fulltrúi skúlans Johan Eli Ellendersen, staddur í Føroyum.
Ring og frætt nærri ella avtala ein fund tlf.: +45 6010 0151 / +298 31 24 86 mail: jee@vitusbering.dk
VITUS BERING DENMARK
CENTER FOR VIDEREGÅENDE UDDANNELSE
STRANDPROMENADEN 4C
DK-8700 HORSENS
TEL. +45 7625 5000
FAX. +45 7625 5100
MAIL: VB@VITUSBERING.DK
www.vitusbering.dk

HALDIÐ SOSIALIN



450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu
600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)
Sosialurin
ÁRGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO
Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64
Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.
Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Til sølu
Citroen Saxo 1,5 DIESEL



Bilurin er í sera góðum standi, væl viðfarin og góður at koyra.
Prísur:
kr. 58.000,-
Útgjald einans kr. 15.000,-
Restina práta vit um.
Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging
Sosialurin 341800



UPPBOÐSSØLA
Málningar til sølu, av millum annað.
S.J. Mikines, Hans Hansen og Jóannis Kristiansen
www.hamarin.fo

Faroe Dive
Kavaraskeið
Faroe Dive skipar saman við einum kavara-Instruktøri fyri Grundskeiðið í kaving 26.10.04 til 06.11.04
Frálæran umfatar:
- Kavara Teori
- Grundvenjing í Svimjuhøll
- Kaving í sjógvi
Kostnaður: Kr.4000,- v/Mvg
Kavaraprógvið er góðtikið um allan heim!
Tilmelding á tlf. 218929 / 458939, ella send okkum ein email á faroedive@post.olivant.fo
WWW.FAROEDIVE.FO
FAROEDIVE@POST.OLIVANT.FO

Ortopædiskur skómakari og bandagistur
frá SAHVA verður
á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 16. og 17. nov.
og á Landssjúkrahúsinum 18. nov. 2004.
Tíð fæst við at ringja á tlf. 455463 mánadag og týsdag kl. 10–12.00 í seinasta lagi 9. nov. 2004.

Sosialurin -har tað hendir